**Um 2 dagar byrjar sølan á atlantic.fo**




London er millíónbýurin, har ongum nýtist at keða seg. Býurin er eitt mentanarligt Mekka, víðgitin fyri síni leikhús, listasøvn, konserthøllir og ikki at forgloyma tær vælumtóktu pubbirnar. London er eisini handilsbýurin av øllum. Tað, sum ikki fæst í London, fæst valla aðrastaðni í verðini.

Far inn á atlantic.fo og keyp ferðaseðilin sjálv/ur. Atlantic Airways flýgur til London-Stansted hvønn hósdag og sunnudag.

Íroknað er ferð annan vegin, afturat prísinum kemur ferðaavgjald á 250,-

Vanligir ferðaseðlar kunnu eisini bíleggjast á atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS

www.atlantic.fo

SANSIR 355 355


Skeiðsdepilin:

# Stórur vøkstur í tilgongd til leiðaraútbúgvingar

**Diplomleiðara-, Grundleggjandi leiðara og -Projektleiðaraútbúgving byrjaðu í 2003 við 4 holdum við 18 fólkum á hvørjum holdi**

TÍÐINDASKRIV

Eftir og -víðariútbúgvingarnar á Føroya Handilsskúla og Tekniska Skúla høvdu í 2003 stóran vøkstur í tilgond til leiðaraútbúgving.

Frá í høvuðsheitum at hava havt vanlig 3 daga skeið í t.d. Leiðslu og samstarv byrjaði Skeiðsdepilin í 2003 at bjóða hægri leiðaraútbúgvingar.

Sama mannagongd veður nýtt í fyriskipan og frálærutilfari, sum verður brúkt á Ledelseakademiet, Århus Købmandsskole. Útbúgvingarnar eru rættiliga nýggjar og eru leypandi dagførdar tey síðstu 6 árini.

Útbúgvingarnar eru framdar við góðum úrsliti í Danmark, Grønlandi og nú eisini í Føroyum.

Fyrimunurin við at luttaka á útbúgvingini á Skeiðsdeplinum er, at royndargrundaða frálæran kann vera í tøttum samanspæli við gerandisdagin hjá luttakaranum og øðrum javnsettum leiðarum. Júst orðið royndargrundað leiðaraútbúgving er sentral á hesum útbúgvingum, sum í mun til aðrar meiri formellar leiðaraútbúgvingar leggur dent á praktiska og útinnandi leiðslu. "Handlling giver forvandling" er lyklaorðið.

Ein annar fyrimunur við at taka eina slíka leiðaraútbúgving í Føroyum er, at útreiðslurnar eru nógv minni í mun til, um man noyðist at fara uttanlands at útbúgva seg.

**Fyrra hálvár 2004 byrja nýggj hold:**

- Grundleggjandi leiðaraútbúgving, 12 dagar yvir 1/2 ár
  byrjar 15. mars 2004
- Diplomleiðaraútbúgving, 40 dagar yvir 2 ár
  byrjar 22. mars 2004
- Projektleiðaraútbúgving, 6 dagar yvir 3 mðr.
  byrjar 21. apríl 2004

Tilmelding skjótast til Skeiðsdepilin á tel. 31 8813.

Lesið meira um útbúgvingarnar á heimasíðu www.skeidsdepilin.fo




**Oktan 95 bensin frá komandi viku**

*Nú flestu bensinriknu bilar kunnu koyra við oktan 95, fara vit frá komandi viku at selja hetta bensinið. Tí átti tú at kannað, um tín bilur kann koyra við oktan 95. Les um hetta í leiðbeiningarbókini til bilin, ella spyr teg fyri hjá bilumboðnum.*

*GG! Oktan 98 bensin verður framvegis at fáa á ávísum støðum.*

REPROZ

STATOIL




# Størsta handilsmiðstøð í Skandinavia

**Týsdagin letur nýggja handilsmiðstøðin á Amager við Kastrup Lufthavn í Keypmannahavn upp. Talan er um størstu handilsmiðstøð í Skandinavia. Roknað verður við, at 150.000 fermetra stóra handilsmiðstøðin fer at merkjast hjá handilslívinum í danska høvuðsstaðnum**

HANDILSMIÐSTØÐ
*Símun J. Hansen*



*Field's er við 150.000 fermetrum tríggjar ferðir størri enn Fiskatorgið, sum liggur inni á Dybbølsbro.*
*Mynd: Símun J. Hansen*

Størsta bygging í danskari søgu er nú um at vera liðugt. Talan er um stóru handilsmiðstøðina »Field's«, sum liggur nærhendis Kastrup Lufthavn. Handilsstøðin fær egna avkoyring av motorvegnum og nýggja metroin í Keypmannahavn fer at steðga beint uttan fyri handilsmiðstøðina. Pláss verður fyri umleið 2000 súkklum og 3000 bilum á parkeringsøkinum.

Field's er størsta handilsmiðstøð í Skandinavia og eitt tað størsta arbeiðsplássið í Danmark við umleið 3000 starvsfólkum.

Handilsmiðstøðin er 150.000 fermetrar til støddar, og umleið 135 handlar fara at hava innivist har. Harumframt verður talan um 20 matstovur og eina stóra ítróttarmiðstøð.

Sum dømir upp á handlar kunnu nevnast: Bilka, Hennes & Mauritz, Toys R Us, Stadium, Next ofr.

Byggingin av Field's hevur gingið væl, og nú arbeiðið er um at vera liðugt, sigur leiðslan á Field's, at næstan øll leigumálini eru komin upp á pláss.

Leiðslan sigur eisini, at talan er um eitt heilt nýtt slag av handilsmiðstøð. Fasadan er av sandsteini og glasi, sum vera gjørd livandi av stórslignum ljósi. Tá tú stígur inn í Handilsmiðstøðina fert tú at upp-liva nógv pláss, har høgt er til loftið og vítt til veggja.

C.F. Mørrer teknistovan hevur teknað handilsmiðstøðina, og Terry Evendsen hevur ábyrgdina av øllum innanduraarbeiðinum. Entreprenørar eru MT Højgaard og Pihl & Søn.

Framrokningar vísa, at Field´s væntandi fer at umseta fyri heilar 2,6 milliardir krónur í 2012. Og hetta kemur sjálvandi at merkjast aðrastaðni í býnum.

Nógv hevur verið gitt um, hvussu tað fer at ganga hjá nýggju handilsmiðstøðini, og eisini hvørji árin Field's fer at hava á nærumhvørvið. M. a. verður mett, at Fiskatorgið við sínum 50.000 fermetrum fer at missa umleið 18% av umsetninginum, og at miðbýurin í Keypmannahavn fer at missa umleið 5% av umsetninginum. Leiðslan í Field's avvísir, at Field's fer at føra við sær »handilsdeyða« á Amager.

Væntandi fara handlar á Amager at missa umleið 8% av umsetninginum til Field's.

Men hvussu er og ikki, so fer stóra handilsmiðstøðin á Amager at draga nógv fólk, sum ferðast umvegis Kastrup í bili ella flogfari, inn á gólvið.

Field's letur upp 9. mars 2004.

Idé Møblar 25 ár:

# Nøkur túsund í føðingardag




*Nøkur túsund fólk nýttu høvið at koma í føðingardag hjá Idé Møblum. Ein pylsuvognur var settur inn í handilin*
*Mynd: Árni Conradsson*

**Í sambandi við at Idé Møblar fyltu 25 ár tann 19. februar, varð føðingardagurin hildin fríggjadagin og leygardagin i seinastu viku**

FYRITØKA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Nøkur túsund fólk komu inn í handlin hjá Idé Møblum, har ókeypis pylsur, kaffi og karamellur vóru at fáa. Eisini vóru ballónir til børnini. Ein pylsuvognur varð settur inn í handilin til endamálið.

Elsebeth og Birgir Andreasen frá Idé Møblum siga, at tey vórðu heilt ovfarin av, at so nógv fólk komu í føðingardag, eisini fingu tey nógvar heilsanir.

Tey takka øllum, sum sýndu teimum hendan heiður á føðingardegnum.


J. Broncksgøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo

**So fara vit á páskaferð, páskaferð, páskaferð...**




Danland – er vorðið eitt hitt best umtókta ferðamálið hjá føroyingum

2 VAKSIN OG 2 BØRN + BIL

**1 vika í Danlandi 6.995,-**

**Íroknað er:** ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari við wc/bað, innan. Uppihald í Danland-íbúð í Hirtshals, Blokhus ella Ebeltoft í 1 viku. Fráferð 01.04 ella 08.04.




Danland frítíðardeplarnir hava vælinnrættaðar íbúðir við køki og nógv frítíðartilboð eru fyri bæði vaksin og børn.




Pers Hotel er ein av teimum fáu frítíðardeplunum í Noregi, ið hava baðiland. Depilin liggur í tí avbera vakra Gol-økinum. Sera barnavinarligt við einum hópi av frítíðarmøguleikum. Koyritíðin frá Bergen er einar 4-5 tímar.

**1 vika á Pers úr 6.000,-**

**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Bergen og aftur í 4-koyggjukamari innv. við wc/bað. Hartil 7 gistingar í smáttu, uttan kost og 2 gistingar í Bergen á út- og heimferðini.



2 VAKSIN OG 2 BØRN + BIL

**1 vika í summarhúsi í Easterhoull í Hetlandi**

Summarhúsini hava køk og baðirúm og eru væl útgjørd annars. Tey hava 2 ella 3 kømur og kunnu hýsa upp til 6 fólkum.



**1 vika úr 4.500,-**

**Íroknað** ferð við gisting fyri 2 vaksin og 2 børn við bili fram og aftur

SMYRIL LINE